

# Ein mikudagur á bygd

Tekstur: Snorri Brend
*Myndir: Jens Kristian Vang*

**Mikudagin í farnu viku var bygdaredaksjónin hjá Sosialinum á vitjan í Norðoyggjum. Úrslitið av vitjanini sæst í hesum Oyggjablaðnum, her vit bera tíðindi úr Kunoy og Norðdepli.**
**Umframt samrøður við nógv áhugaverd fólk, nýtti myndamaðurin eisini tíðina væl, við m.a. at fanga ymiskar gerandisligar hendingar á hesum støðum.**
**Á hesi miðsíðuni fær lesarin eitt lítið innlit í lívið í hesum báðum bygdunum ein vanligan mikudag í mai mánaði 2010.**

## SÓLSKINSSØGA Í REGNINUM

*Teir gomlu og staðkendu plagdu at siga, at betri havn enn hana norðuri í Ánunum fekst ikki. Góðshavnin á staðnum hevur av sonnum verið ein succes, síðani hon varð tikin í nýtslu. Regntunga mikumorgunin í farnu viku lá "Atlantic Lady" við bryggju í Ánunum*

## ÚTRÓÐUR

*Eitt av stóru samrøðuevnunum í Klaksvík er uttan iva alt, sum hevur við útróðurin at gera. Ein maður riggar bátin til fiskiskap, og hetta fangar sum vera man áhugan hjá øðrum*